

# PUNKA FØROYSKA SANGSKATTIN

**Punk trio'in The Dreams leggur í morgin síðstu hond á upptøkurnar av fyrstu fløguni hjá bólkinum. Fløgan punkar føroyska sangskattin og fær Grønu Sangbók at ljóða, sum hon ongantíð hevur ljóðað áður**

POPP-PUNKUR

Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Seinastu báðar vikurnar hevur The Dreams tikið fløgu upp í Studio Pegasus í Klaksvík. Hetta kann gerast bæði fyrsta og síðsta fløga, ið bólkurin ger til føroyska marknaðin. Tveir av limunum eru longu fluttir til Danmarkar, meðan tann triði flytur niður í næstum. Síðan The Dreams skiftu navnið Zink út, og endaðu í favninum hjá amerikansku songkvinnuni Anastaciu, hevur næstan alt tos um The Dreams snúð seg um bólkin og útlandið. Men nýggja fløgan snýr seg bara um føroyska heimamarknaðin.

### Føroyskir slagarar

The Dreams hevur hesar seinastu vikurnar tikið 10 løg upp, tey flestu av hesum eru sannir slagarar. Hettar eru løg sum Til allar vinir hjá Blátt, 80'ini hjá Frændum, Sirkús Tinganes hjá Annfinn & Co., Sasa sa sa hjá Georg eystan Á, Forelskaður sjónleikari hjá Páll Finnur Páll, Eg siti so eina hjá Vestmonnum og Nummar hjá Terja Rasmussen. Teir tolka eisini Nalju klassikaran "Sjeikurin", ið Poppkorn eisini tolkaðu herfyri.

Men Eirikur Gilston Corfitz Andersen bassleikari í The Dreams lovar, at teirra útgáva verður nógv betur, og flennur. Hann sigur, at teir eru øgiliga væl nøgdir við úrslitið. Tað hevur riggað væl, at gjørt løgini um til Popppunk. Í stíl minnur fløgan um eitt nú Green Day, Blink 182 og Sum 41, sigur hann. "Vit hava spælt popppunk í 4-5 ár nú, so tað liggur heilt natúrligt hjá okkum, at spæla løgini í okkara stíli", sigur hann.

### Gomul ætlan

Í MTV sendingini A Cut, tulkaðu The Dreams eitt lag hjá Anastaciu, og nærliggjandi er tí at spyrja, um henda tulkingin gav teimum hugskotið til hesa fløguna. Men tað gjørdi hon ikki, sigur Eirikur. Hann greiðir frá, at hugskotið er gamalt. Tá teir itu Zink spældu teir einaferð "Forelskaður sjónleikai" í eini punk útgávu, tað var stuttligt. Tí hava teir spælt við tankan um eina tílíka útgávu leingi.

Teir dáma allir væl bólkin Me First And The Gimme Gimmies, ið er ein bólkur, ið tolkar kend løg í punk útgávum. Bólkurin hevur limir út NOFX, Foo Fighters og Lagwagon og hevur givið fleiri útgávur út. So huskotið kemur kanska frá teimum, sigur Eirikur, ið tó viðgongur, á at teir als ikki gera líka ráðar útgávur av løgunum sum Gimme Gimmes - Vit spæla popppunk, sigur hann.

### Leitaðu í Grønu Sangbók

Tað eru teir í The Dreams, ið sjálvir hava valt løgini. Hetta varð m.a. gjørt við at blaða í Grønu Sangbók greiðir Eirikur frá. Nógv av løgunum, ið teimum dámdu høvdu fimm vers og einki niðurlag, so tey vórðu droppaði. Eftir sótu teir so at endans við 10 løgum, ið eru tey, ið vera á fløguni.

Løgini eru flest øll kend, og á onkran hátt vorðin fólkaogn. Men ein jokari er eisini við. Hetta er lagið "Nú ert tú ein onnur" hjá Eyðun Nolsøe av fløguni Eyðun og Terji. Lagið gjørdist ongantíð eitt stórt hitt, men sambært The Dreams hevur tað stórt hittpotentiali, og riggar væl í popppunk útgávu.

### Ringt at meta um yndisløg

Eirikur sigur, at hann heldur, tað vera ringt at meta um, hvørji løg eru tey bestu á fløguni. Men hann er persónliga serliga væl nøgdur við Til allar vinir og 80'ini, ið hann heldur rigga øgiliga væl.

### Kemur út 1. mei

Tað er ljóðtøkningurin Ingi Isaksen, ið hevur snarað knøttunum saman við teimum í The Dreams í upptøkuhølunum hjá Pegasus í Klaksvík. Fløgan verður nú ljóðblandað í Kristoff Studio inni á Gøtu í Hoyvík av Kristoffur Mørkøre. Fløguhúsan ger Heiðrikur av Heygum. 3'arin stendur fyri útgávuni. Væntandi verður fløgan í handlunum 1. mei.

### Útlandið bíðar

Í síðstu viku varð almannakunngjørt, at The Dreams fer at spæla á Spot-festivalinum í Århus fyrsta vikuskiftið í juni. Men hetta er bert ein av fleiri konsertum við The Dreams í Danmark. Í løtuni verður arbeitt við konsertum saman við tveimum donskum bólkum.